Sigurd Leivsson Lamhauge:

# Hevur ritað navn sítt í ítróttarsøgu Føroya

*Sigurd L. Lamhauge hevur í roynd síni at renna og svimja úr Akrabyrgi til Kirkju framt brøgd, ið eru nærum ótrúlig.*

Fyri góðari viku síðani frættist, at tann 22 ára gamli havnarmaðurin Sigurd L. Lamhauge ætlaði sær at renna og svimja úr Akrabyrgi til Kirkju á Fugloynni — uppá eina viku, um veðrið var til vildar.

Mong vóru tey, ið hildu hetta vera óðamannaverk og ráddu tey honum frá at royna hesa ferðina.

Serliga spáddu tey, at trupult vildi vera hjá Sigurdi at svimja um Suðuroyarfjørð. Tey greiddu honum frá trupulleikunum hjá Sigmundi á sinni og søgdu honum eisini frá tá Birgir Enni, Torstein Holm og Knút Bjørk fyri nøkrum árum síðani svumu úr Dímun til Hvalbiar.

Sigurd vildi tó royna seg og byrjaði at ganga úr Akrabyrgi til Hvalbiar mikudagin. Hesin túrur gekk væl og kom Sigurd til Hvalbiar seks og ein hálvan tíma aftaná at hann var farin úr Akrabyrgi. Dagin eftir byrjaði hann so at svimja frá Sandvík til Sandoyar, men ikki bar til í fyrsta umfari: Líkindini vóru ikki av teimum bestu og aftaná stutta tíð mátti Sigurd gevast m. a. orsakað av sjóverki.

### Magatrupulleikar

— Sjálvur haldi eg at tað var tann konsentreraða føðin, ið eg fekk mær áðrenn túrin, ið magi mín ikki toldi, segði Sigurd, tá vit tosaðu við hann sunnukvøldið. — Henda føðin er tann, ið verður nýtt í bjargingarbátum og er hon, hóast hon ikki fyllir nógv, ógvuliga proteinrík, og orsøkin til at eg siga at tað møguliga var hon, ið voldi trupulleikar er, at eg, tá eg varð noyddur at venda aftur og gisti hjá tí ógvuliga blíða Olaf Jacobsen í Leirum í Hvalba, fekk stak góðan føroyskan mat og síðani tá ikki havi havt magatrupulleikar, sigur Sigurd.

Ikki fyrr enn leygardagin var veðrið aftur til vildar og klokkan tjúgu minuttir yvir ellivu fyrrapartin fór hann so á sjógv





Sigurd kemur rennandi oman á Hvítanes





av Mjóvanesi millum Hvalba og Sandvík.

Og nú bar til.

### Svam á Søltuvík

Sigurd Hevði ætlað sær at svimja heim á Sand, men líkindini vóru ikki til tess, og valdi hann tí at svimja inn í Søltuvík og kom hann hagar knappar seks tímar aftaná, at hann var farin úr Suðuroy — sum tann fyrsti, ið hevur svomið millum Suðuroynna og Sandoynna.

Úr Søltuvík gekk Sigurd so til Skopunar sunnumorgunin og klokkan 11.35 fór hann so á sjógvin av Streymnevi eystan fyri Skopun fyri at svimja tvørtur um Skopunarfjørð — til Kirkjubøar.

### Inn á Hælin

Heldur ikki her gekk alt sum ætlað. Streymurin var ógvuliga harður og tá hann aftaná at hava roynt í langa tíð at koma burtur úr harða rákinum, var Sigurd noyddur at broyta ætlan og eisini fara á land á Hestoynni. Hann svam inn til Hælin og gekk so heim í bygdina og legði so beint á bláman og nýtti bert 50 minuttir um at svimja yvir fjørðin til Velbastaðar.

### Hetjumóttøku

Á Velbastað fekk Sigurd sanna hetjuvælkomu. Stórur hópur av fólki — fleiri hundrap í tali — var savnaður fyri at heilsa og heiðra honum. M. a. fekk hann laurberjakrans og varð heilsaður við røðum og hurrárópum.

Aftaná steðg í Búðini á Velbastað fór Sigurd so til gongu tvørtur um Reynið og niðan á Hvítanes — har hann aftur varð møttur av stórari mannfjøld; enn einaferð fleiri hundrað.

Komin oman í Akkersvík uppdagaði Sigurd, at hann hevði gloymt fitjur sínar, men ikki gekk long tíð til hjálparmaður hansara, Jákup Jacobsen, hevði fingið hendur á teimum. Og so, um klokkan sjey um kvøldið kundi Sigurd so fara út í aftur fyri at svimja inn á Nes og rann síðani beinanvegin til Gøtu, har hann var kl. hálvgum tólv og gisti um náttina.

Enn restar Sigurd kanska strævnasta strekkið á leið síni, svimjitúrin úr Viðvík til Kirkju, men longu nú kann sigast at Sigurd hevur framt bragd — ella brøgd — ið hava ritað navn hansara í ítróttarsøgu Føroya.









Nøgv fólk var komið saman á Nesi at taka ímóti Sigurdi



*Niels Kári Nielsen var ein av føroysku súkklarunum á Isle of Man. Hóast úrslitini kanska ikki vóru tey bestu, so hevur hesin unglingi ikki givið skarvin yvir. Hann heldur fram við venjing síni.*

*Tá vit hittu hann sunnudagin segði hann, at einasta, ið er at gera, er at halda fram.*

*— Vit hava lært nakað á Isle of Man, men hetta er í sær sjálvum ikki nóg mikið. Vit mugu hava ein venjara, annars kemur súkkluítróttin ikki víðari í Føroyum. Sum er liggja vit jú púra stillir um veturin og kennist tað tí sum um ein skal byrja heilt frá botni av aftur um várið. Tað eru jú bert tvey ár til oyggjaleikarnar á Guernsey og bert fýra til teir vera í Føroyum, so tað er ikki tann langa tíðin vit hava, sigur Niels Kári Nielsen.*